umhvørvisstovan

# Brenning av timbri, spønum o.ø. á virkjum

**Vegleiðingin er ætlað virkjum, eitt nú snikkaravirkjum, timburhandlum o.ø., sum hava leivdir av timbri, spønum o.ø.[1]**

Loyvt er, at virki brenna timbur, spønir o.a.

**Treytin er, at:**

- brenningin ikki elvir til ampar av royki o.ø.,
- endamálið er at vinna hitan burtur úr tilfarinum
- brenningin fer fram í ovni, sum er egnaður til endamálið
- talan bara er um reinan, ikki rotvardan við
- einki annað burturkast verður brent, so sum plast o.a.

Kommunan hevur eftirlit við slíkari brenning. Standast ampar av brenning, hevur kommunan heimild at geva boð um, at neyðug tiltøk skulu setast í verk fyri at fyribyrgja hesum, ella um neyðugt, at banna framhaldandi brenning[2].

1 Víst verður annars til vegleiðing frá Umhvørvisstovuni um brenning á báli ella eldstaði, sí www.us.fo
2 Sambært grein 8 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, sum broytt við kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009

Fyrstu ferð útgivin: 21.12.2006
Seintast dagført: 09.07.2010
Útgava nr.: 2



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo